# Fýra nýggjar bøkur

**Bókadeild Føroya Lærarafelags hevur sent fýra nýggjar bøkur á marknaðin**

ÚTGÁVA
*tíðindaskriv*



Talan er um smábarnabóina, Hin svanga ormveran, eftir Eric Carle, barnabøkurnar, Stóra søgubókin hjá Flekki, Reytt hjarta og bláur firvaldur, eftir Anniku Thor og Vinur mín sjeikurin úr Stureby eftir Ulf Stark.

Hin svanga ormveran er klassikari. Bókin er komin út í 25 milliónum eintøkum allan heim. Tað er mánalýsi, og eitt lítið egg liggur á einum blaði. Tá ið sólin rísur, rivnar eggið, og út kemur ein lítil, svong ormvera. Turið Kjølbro týddi úr enskum.

Bókin, sum er væl egnað til tey 0-3 ára gomlu, er 28 litsíður til støddar og kostar 90. kr.

Stóra søgubókin hjá Flekki fevnir um tíggju fittar søgur um Flekk og vinir hansara. Tú kanst lesa um, tá ið Flekk bygdi sær eina smáttu, læt seg í saman við Sørini og Annu, og skuldi sova í tjaldi fyrstu ferð. Søgurnar eru sera væl egnaðar at lesa upp fyri børnum, sum dámar at hoyra um Flekk og vinir hansara. Eyðna Magnussen týddi úr enskum. Bókin, sum er væl egnað til tey 4-7 ára gomlu, er 78 síður í litum og kostar 120 kr.

Reytt hjarta, bláur firvaldur er søgan um reyða hjartað, sum Alva gav Viktori og um bláa firvaldin, sum hon fekk frá honum. Um heitar kenslur millum stór børn, og um at tora at standa við tær. Karl N. Hansen týddi úr svenskum.

Bókin er ætlað teimum 8-10 ára gomlu. Hon er 126 síður til støddar og kostar 140 kr.

Vinur mín sjeikurin úr Stureby er um Ulf og vinirnar. Ein arabiskur sjeikur skal koma at vita pápa Ulf. Og Ulf hevur lært seg at hypnotisera, so nú kann hann fáa Lassa Ågren, Marionnu og Percy at gera, hvat tað skal vera. Í hvussu er eina tíð. Men at Percy, allarbesti vinur hansara, skal flyta, fær hann einki gjørt við. Ella fær hann?

Hendan bókin er um somu persónar og sama barndóm sum fyrra bókin hjá Ulf Stark, Gandaskógvarnir hjá vini mínum Percy. Og eins og hon er henda bæði heilt ótrúlig og nærum púra sonn. Hugin Eidi týddi bókina úr svenskum. Bókin, sum er væl egnað til tey 11-12 ára gomlu er 108 síður og kostar 120 kr.


Vágatunnilin



KOYR BARA

Rokning verður send

Koyr beint fram uttan at steðga! Nú skulu øll eftir somu breyt, tá ið tey koyra gjøgnum gjaldstøðina. Allir bilar uttan kubba verða skrásettir við myndatøku, og eigarin av bilinum fær eina rokning sendandi við postinum. Tú kanst gjalda rokningina við heimabanka/heimagreiðslu, í peningastovni ella á posthúsi. Kubbaskipanin heldur kortini fram sum higartil. Tú kanst eisini innan 3 dagar gjalda á bensinstøðum kring landið. Tá verður eingin rokning send.

Frá 1. november verður gjaldstøðin sjálvvirkandi




Steðga ikki við gjaldsstøðina

Mynd verður tikin av bilinum og skrásett

Tú fært rokning við postinum

Gjald við heimabanka, í peningastovni ella á posthúsi

STATOIL VÁGATUNNILIN Shell


# Karsten er nýggjur næstovasti

**Eftir at Torbjørn Jacobsen tók seg frá sum næstformann, hevur Tjóðveldisflokkurin nú sett Karsten Hansen í hansara stað**

TJÓÐVELDISFLOKKURIN
*Jákup Mørk*

Hesum hevur Tjóðveldisflokkurin í dag boðað frá í tíðindaskrivi.

Tingmanning floksins staðfestir, at skrivingin hjá Torbjørni Jacobsen um skrásett parlag fór av kós, tá ið persónsálop og ákoyringar av ymiskum slagi vórðu drigin uppí málið.

Í tíðindaskrivinum verður samstundis sagt, at Torbjørn Jacobsen átti at hildið seg til málið um skrásett parlag í skriving sínari. Somuleiðis verður sagt at fyrrverandi næstformaður floksins harmast um skrivingina, sum kann hava skatt umdømi floksins og trúvirði hjá floksformanninum.

Hinvegin verður einki sagt nakað um nakra umbering frá Torbjørn Jacobsen.

# Limafundur fyri Sjúkrarøktarfrøðingar og lesandi

FUNDUR
*tíðindaskriv*

Mikudagin 11. novembur verður limafundur fyri Sjúkrarøktrfrøðingar og lesandi.

Kristianna Hammer, kandidatur í sjúkrarøkt fer at greiða frá um víðari útbúgvingar og um kandidat høvuðsritgerð sína, undir heitinum: "Sygepleje imellem håb og håbløshed".

Í ritgerðini verður nomið við hugtakið vón, og hvønn týdning vónin hevur fyri varandi sjúk. Hvørjar møguleikar sjúkrarøktarfrøðingar hava, fyri at kunna stuðla undir vónina og mótvirka vónloysinum, og hvønn týdning vónin hevur fyri tann sjúka, í mun til at meistra støðuna.

Tíð og stað verður lýst seinni!



# Klaksvíkar Dansifelag fimti ár

**Tann 17. oktober rundaði Klaksvíkar Dansifelag tey fimti árini. Dagurin verður hildin við einari veitslu í Skálanum í kvøld. Heini Mohr er formaður í felagnum. Hann heldur áhugan fyri føroyska dansinum vera á einari leið, tó at hann saknar fleiri ung**

FØROYSKUR DANSUR
*Solby A. Eliasen*
*solby@sosialurin.fo*



*Heini Mohr er formaður í Klaksvíkar Dansifelag. Her er hann avmyndaður uttan fyri hølini hjá felagnum, Skálin. Húsið varð bygt í 1988, og í dag er felagið nærum liðugt at rinda skuldina*

**Klaksvík:**
Eitt av áhugafeløgunum í Klaksvík, sum má sigast at hava framúr góðar umstøður, er Dansifelagið. Í 1988 varð Skálin bygdur, og í honum hevur felagið eini fyrstafloks høli til eitt og hvørt endamál.

Heini Mohr er formaður í felagnum og hevur verið tað seinastu tíggju árini. Hann greiðir frá, at felagið dansar hvørt sunnukvøld frá klokkan 21. Eisini skipa tey fyri barnadansi sunnukvøld, áðrenn tey meira tilkomnu byrja.

– Vit eru um 40 til 60, sum møta upp hvørt sunnukvøld, so tað er á einari leið. Men tey ungu síggja vit tó ikki so nógv til. Tey kundu verið nógv fleiri í tali, sigur formaðurin í Dansifelagnum.

Hann ber tó ongan ótta fyri føroyska dansinum, tí tað hevur víst seg, at tá fólk náa ein ávísan aldur, so byrja tey at sýna føroyska dansinum áhuga.

– Tað er so nógv annað - serliga útlendskt, sum hugtekur øll tey ungu í dag, at tann mentan og siður, sum veruliga er føroysk, ikki er líka populer, um ein kann siga tað so, heldur Heini fyri.

Hann leggur tó dent á, at tað er ikki tað, at lunnar ikki verða lagdir undir áhugan hjá teimum ungu. Dansað verður á hvørjum ári í skúlunum Føstulávintsmánadag, og næmingarnir læra kvæði samstundis.

– Men tey koma bara ikki her at dansa, staðfestir Heini uttan nakað hóvasták.

## Duga Ormin

Heini heldur tó ikki, at tað er huginum, tað bilar. Tað er ikki nakað dulsmál, at tað ikki er so stuttligt at dansa føroyskan dans, tá ein ikki dugir kvæðini ella bara niðurlagið. Heini heldur, at um ungdómurin heldur royndi at halda seg í ringinum - eisini til tey kvæðini, sum tey ikki duga so væl, so høvdu tey skjótt komið eftir tí.

– Vit kunnu taka Ormurin Langi sum eitt dømi, vísir hann á. Partin, sum Týr eru vorðnir so kendir fyri, duga tey ungu á tamb, men tá so hini ørindini koma, duga tey ikki meira og fara ofta úr ringinum.

– Tey kvøða heldur ikki niðurlagið líka sum vit onnur, so tá stemma tey í og køva okkum burtur við teirra máta at kvøða niðurlagið uppá, sigur Heini og flennir.

Ein onnur møgulig orsøk til, at tey ungu ikki møta so fjølment upp til føroyskan dans í Klaksvík, kann hava nakað við tíðina at gera. Dansað verður sum sagt sunnukvøld, og tá eru rættiliga nógv ung í býnum á møti.

Heini sigur, at tey gott kundu brúkt leygarkvøld upp á tey ungu, men so greiðir hann frá, at felagið er nú einaferð soleiðis fyri, at tað livir eitt nú av at leiga Skálan út til ymisk tiltøk.

– So um vit høvdu gjørt tað, hevði tað verið dekan ov ofta, at dansurin hevði verðið avlýstur vegna onnur tiltøk í húsinum, og tað ber ikki til, slær hann fast.

## Nærum skuldarfrí

Klaksvíkar Dansifelag tók eitt megnarstig, tá tað lat Skálan byggja í 1988. Húsið kostaði góðar fýra milliónir krónur, sum felagið hevur stríðst við at rinda aftur síðani tá. Nú er um at vera komið upp undir land. Heini sigur, at nú resta um 400.000 krónur eftir at gjalda, so er skuldin burtur. Men samstundis er hann greiður yvir, at nú er húsið vorðið 16 ára gamalt, og harvið kunnu fyrstu barnasjúkurnar fara at koma.

– Nú er tað sjálvandi, at alt viðlíkahaldið fer at koma. Men húsið er framvegis í sera góðum standi, sigur hann.

Heini heldur, at Skálin hevur havt stóran týdning fyri felagið, tí við húsinum hava tey havt framúr góðar umstøður.

– Karmarnir eru í topp, og hóast húsið verður nógv útleigað, so royna vit altíð at leggja okkara dagfestingar inn áðrenn, so at vit kunnu nýta tað, tá vit hava brúk fyri tí, greiðir hann frá.

Klaksvíkar Dansifelag byrjaði hetta dansiárið síðst í september, og dansað verður inntil Føstulávint.

– Vit halda fast í tí gamla, at vit ikki dansa í føstuni, so av tí sama verður hetta dansiárið ikki so langt, sigur Heini Mohr, formaður í Klaksvíkar Dansifelag.

# Eldur í Grunningi

**Um hálvgum ellivu tíðina hóskvøldið varð boðað frá eldi umborð á línubátinum Grunningi, sum lá við bryggju í Sørvági. Stórur skaði hendi á afturskipinum, men maskinrúmið slapp toluliga snikkaleyst**

*Edvard Joensen*



*Línuskipið Grunningur fekk stóran skaða av eldi og royki, meðan hann lá við bryggju í Sørvági hóskvøldið*
*Mynd: Jens Kristian Vang*

**Sørvági:**
Stórur skaði hendi umborð á línubátinum Grunningi av Strondum, tá eldur kom í, meðan skipið lá við bryggju í Sørvági hóskvøldið.

Tað tók umleið ein hálvan tíma frá tí, sløkkiliðið í Sørvági kom á staðið, til tamarhald var fingið á eldinum.

Kristian Olsen, sløkkiliðsleiðari í Sørvági, sigur, at hann fekk fráboðan frá Alarmsentralinum klokkan 22.25 um, at boðað var frá royki umborð á Grunningi, sum lá við bryggju í Sørvági.

Fimm minuttir seinni vóru seks sløkkiliðsmenn úr Sørvági á staðnum, og hinir seks, sum mannað sløkkiliðið, vóru skjótir.

## Samstarv

Greitt var beinanveg, greiðir Kristian Olsen frá, at roykurin var so nógvur umborð, at neyðugt varð við fleiri roykkavarum, enn teir hava í Sørvági. Tí boðsendi hann beinanveg sløkkiliðnum í Miðvági-Sandavági. Umframt fingu teir eisini hjálp frá sløkkiliðnum á flogvøllinum, sum eitt nú fylti luftfløskur o.t. fyri teir, sigur Kristian Olsen.

Hann sigur, at tað var eitt sindur torført at fara umborð, tí í fyrsta lagi var skipið stongt, og í ørðum lagi var tað trongt. Umframt at menninir vóru ókendir umborð.

– Har var øgiliga nógvur roykur og varmi umborð, greiðir sløkkiliðsleiðarin í Sørvági frá. Og tað vóru alla tíðina skammlop ymsastaðni, tá teir ymsu elektrisku leidningarnir brunnu av.

Hann greiðir frá, at eldurin eftir øllum at døma er kyknaður í kabússuni. Gallan er farin fyri einki. Tað sama er við messuni og brúnni.

– Alt á brúni er oyðilagt. Annahvørt av eldi ella hita greiðir Kristian Olsen frá. Stutt sagt er alt afturskipið, sum tað er omandeks, farið fyri einki, sigur hann. Á dekkinum hevur hitin eisini gjørt stóran skaða á alt, sum gjørt er úr aluminium. Kør og kassar, egningarmaskina og tílíkt. Línan, sum hekk í skúrinum, er eisini farin fyri einki.

Alt skipið er illa herjað av royki. Har, sum eldur og varmi ikki hava gjørt um seg, hevur roykurin verið. Tó sigur hann, at maskinrúmið sá hampiligt út.

## Fleiri mánar

Tað kann fara at taka fleiri mánar at umvæla skaðan, sum Grunningur fekk av eldinum, metir Kári Hansen, reiðari.

Hann var í Sørvági, meðan eldur var í skipinum. Hann varð borsendur, eftir at fráboðanin var komin til alarmcentralin.

– Tað kendist sum at fáa nevan á kjaftin og ikki fáa sligið aftur, sigur Kári Hansen. Her hevur man gingið í eini tjúgu ár umborð, og so fer alt eftir eini løtu. Tað er hugstoytt, sigur hann.

Kári Hansen hevði, tá Sosialurin tosaði við hann fríggjamorgunin, ikki nakað endaligt yvirlit yvir støðuna. Sýnsmennini høvdu enn ikki verið umborð, so støða varð ikki tikin til nakað sum helst.

– Tað einasta, sum greitt er í løtuni, er at 12 mans nú standa uttan arbeiði, sum støðan er, sigur hann.

Grunningur lá mannleysur, tá eldurin kyknaði umborð. Manningin var fain av skipinum einar fýra tímar áðrenn fráboðanin um royk kom.